# Grønlendingar flyta úr Grønlandi

Tey seinastu trý árini hava altsamt fleiri grønlendingar valt at flyta av landinum, og hagtølini vísa, at í fjør var nettofráflytingin tann størsta síðani 1992. Tað eru tey, sum siga, at talan er um eina veruliga flýggjan ella í minsta lagi um eina veksandi útflyting, sum hevur tikið dyk á seg tey seinastu trý árini. Hagtølini hjá grønlendsku hagstovuni vísa, at í fjør valdu 3.048 fólk at flyta úr Grønlandi, og tað er tað mesta seinastu 15 árini. Hinvegin fluttu 2.404 fólk til Grønlands í fjør, og sostatt var nettofraflytingin 644, sum eisini er tað mesta seinastu 15 árini. Harafturat vísa tølini, at nettofráflytingin er vaksin á hvørjum ári tey seinastu seks árini. Tølini vísa eisini, at fráflytingarmynstrið er galdandi bæði fyri tey, sum eru fødd í Grønlandi og tey, sum eru fødd aðrastaðni. Í báðum førum hevur fráflytingin verið veksandi og serliga tey seinastu árini.



# Krevja kvotur fyri fígging

Í Grønlandi hevur heimastýrið gjørt av at endurskoða verandi fiskivinnulóggávu. Ein broyting verður, at kvotur, sum eru veittar í óavmarkaða tíð, kunnu broytast til avmarkaða tíð við fimm ára freist. Men danski Skipskreditgrunnurin ger nú vart við seg. Grunnurin hevur fíggjað grønlendska trolaraflotan við 10 - 15 ára afturgjaldstíð og vil nú hava fulla vissu fyri, at skip varðveita sínar kvotur øll árini. Um ikki, so verður eingin fígging.

## Nógvir samgongu-møguleikar

**Samgongan kann halda fram, tvíflokka-samagonga, heima-stýrissamgonga og fullveldissamgonga. Sambært dagsins veljarakanning eru nógvir møguleikar**

VELJARAKANNING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Sambært dagsins veljarakanning, so varðveitir sitandi samgongan meirilutan upp á 21 tingsessir. Broytingin er tann, at Fólkaflokkurin missir ein tingsess, sum Sambandsflokkurin vinnur. Men av tí at tingmannatalið veksur til 33, vinnur andstøðan, Tjóðveldisflokkurin, eisini ein tingsess.

Men hóast samgongan varðveitir sína støðu, so eru nógvir aðrir samgongumøguleikar.

Ein kundi verið, at Tjóðveldið og Sambandsflokkurin í kastaðu saman í eina tvíflokkasamgongur. Teir hava tilsamans 17 tingsessir.

Síðani 1948 hava vit bara havt tvær tvíflokkasamgongur, tann fyri 1950-54 við Sambandsflokkinum og Fólkaflokkinum, og tann seinna frá 1990-1993 við Javnaðarflokkinum (10 tingfólk) og Fólkaflokkinum (7 tingfólk).

Annar møguleiki er gamla heimastýrissamgongan millum Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin og Sjálvstýrisflokkin. Ein slík samgonga hevði eisini havt 17 tingsessir. Seinasti hendan samgongan varð roynd, var frá 1966-74

Men fullveldissamgongan frá 1998 hevði eisini havt meiriluta, tí Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin hava tilsamans 17 tingsessir, so møguleikarnir eru nógvir.

# Samgongan eftir hæli

**Sambært seinastu veljarakanningini missir sitandi samgonga 6,2% av atkvøðunum, svarandi til tveir tingsessir**

VELJARAKANNING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

| | Løgtingsval jan. '04 | Kanning desember 2007 | Í mun til seinasta val | Tingmannabýti við seinasta val | Tingmannatal í kanning | Broyting í tingmannatali |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkaflokkurin | 20,6 | 17,1 | -3,5 | 7 | 6 | -1 |
| Sambandsflokkurin | 23,7 | 23,7 | 0,1 | 7 | 8 | 1 |
| Javnaðarflokkurin | 21,8 | 19,1 | -2,8 | 7 | 7 | 0 |
| Sjálvstýrisflokkurin | 4,6 | 5,3 | 0,7 | 1 | 1 | 0 |
| Tjóðveldisflokkurin | 21,7 | 24,5 | 2,8 | 8 | 9 | 1 |
| Miðflokkurin | 5,2 | 7,8 | 2,5 | 2 | 2 | 0 |
| Miðnámsflokkurin | | 2,5 | 2,5 | | 0 | |
| Hin stuttligi flokkurin | 2,4 | | -2,4 | 0 | | |
| **Tilsamans** | 100,0 | 100,0 | | 32 | 33 | |

Nýggjasta veljarakanningin, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin er ikki serliga hugaligur lesnaður fyri samgonguna – serliga ikki fyri Fólkaflokkin og Javnaðarflokkin.

Í gjár kunngjørdi Dimmalætting eina kanning, sum sá heldur ljósari út, sæð við samgongubrillum, men dagsins kanning vísir, at samgongan missir tilsamans 6,2% av atkvøðunum, og tað hevði verið nóg mikið til tveir tingsessir hjá einum flokki.

Hvør tingsessur kostar við nýggju valskipanini 3,03%. Men av tí at Sambandsflokkurin ikki fekk teir átta tingsessirnar, hann átti at fingið á síðsta løgtingsvalið, so hevur sitandi samgonga í veruleikanum ein tingsess ov lítið, og tí varðveitir samgongan kortini teir 21 tingsessirnar, meðan andstøðan vinnur ein afturat, tí tingmannatalið sum kunnugt økist úr 32 upp í 33 sessir.

Serliga hart gongur tað út yvir Fólkaflokkin, sum missir 3,5% av undirtøkuni. Tað merkir, at flokkurin missir ein tingmann.

Javnaðarflokkurin missir 2.8% í mun til seinasta val, og tað táttar væl í, at flokkurin missir ein tingmann.

Sambandsflokkurin fær eina lítla framgongd, 0.1%, og er tað nóg mikið til, at flokkurin vinnur tann tingsessin, sum hann í veruleikanum átti at fingið við seinasta val.

Fynd gjørdi eina aðra veljarakanning fyri Sosialin beint fyri fólkatingsvalið 13. november. Tá var eisini spurt, hvussu fólk fóru at velja til løgtingsvalið.

Í mun til ta kanningina, so hevur samgongan mist 2.8%. Aftur er tað serliga Fólkaflokkurin, sum missir mest, 1.7%, meðan Javnaðarflokkurin missir 1%. Sambandsflokkurin missir 0.1%.

Tjóðveldið hevur í dagsins kanning eina framgongd upp á 2,8%. Hann fer úr 21,7% á seinasta løgtingsvali til 24,5%. Men í mun til kanningina í november er talan um eina framgongd upp á 2,6%, so vit kunnu staðfesta, at fleiri forskjótingar eru farnar fram seinasta mánaðin.

Miðflokkurin hevur í øllum kanningum staðið til framgongd. Men í dagsins kanning fær hann "einans" 2,5% í framgongd til 7,8%. Í kanningini í november fekk hann heili 10.7%.

Sjálvstýrisflokkurin fær í dagsins kanning 4,6%. Hetta er ein framgongd upp á 0.7%. Í mun til kanningina í november er hetta ein framgongd upp á 0.5%.

Broytingin í tingfólkabýtinum er tann, at Fólkaflokkurin missir ein tingsess, meðan Sambandsflokkurin vinnur ein. Soleiðis hevur samgongan sama meirilutan, 21 tingsessir.

Tjóðveldisflokkurin vinnur eisini ein tingsess og kemur upp á níggju tingsessir.

Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin standa í stað á ávikavist tveimum og einum tingsessi. Her er vert at geva gætur, at pláss ikki verður fyri øllum teimum trimum, sum nú umboða Miðflokkin.

# Miseydnað misálit

**At døma eftir føroysku veljarunum var misálitið frá andstøðuni á løgmann ikki nøkur klók avgerð, tí 65 prosent av veljarunum halda, tað var skeivt at leggja uppskotið fram**

VELJARAKANNING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Fyri viku síðani setti andstøðan fram misálitisuppskot á Jóannes Eidesgaard, løgmann, í sambandi við, at samgongan vildi leingja tingarbeiðið í tvær vikur við at broyta freistina at útskriva løgtingsval úr seks niður í fýra vikur.

Hetta kom tó ongantíð til atkvøðugreiðslu, tí Sambandsflokkurin kom við broytingaruppskoti, so hetta ikki skuldi koma í gildi fyrr enn 1. januar 2009. Úrslitið av hesum gjørdist, at løgmaður útskrivaði val sama kvøld, og tí varð hvørki atkvøtt um misálit ella broytingaruppskot.

Sambært veljarakanning, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin, heldur ein rættiliga stórur meiriluti føroysku veljarunum, at tað var skeivt av andstøðuni at leggja uppskotið fram. 65 prosent halda, at uppskotið ikki átti at komið í tingið. 23 prosent halda, tað var rætt, meðan 13 prosent ikki siga seg vita.

Um hugt verður eftir floksbýtinum ávikavist í nei, ja og vita ikki-svarum, so er býtið 75, 16 og 9 prosent í Fólkaflokkinum, fyri Sambandsflokkin 74, 10 og 16 prosent, í Javnaðarflokkinum 92, 7 og 2 prosent, Sjálvstýrisflokkinum, 65, 20 og 15 prosent, Tjóðveldi 42, 41 og 17 prosent, Miðflokkinum 44, 35 og 22 prosent og í Miðnámsflokkinum 75, 0 og 25 prosent.



*Um meirilutin av føroysku veljararnir ráddu, var misálitisuppskotið á løgmann, sum Høgni Hoydal stóð á odda fyri, ongantíð komið í Løgtingið*

*Savnsmynd*